# Norrøna fullsett til Danmarkar

**Í hesum døgum fara føroyingar í hópatali til Danmarkar at halda páskafrí. Við Norrønu seinnapartin í dag eru ikki færri enn 1320 ferðafólk**

FERÐAVINNA
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*




*Norrøna verður fullsett av føroyingum, sum skulu til Danmarkar í páskafrí, tá ið hon fer av Havnini seinnapartin í dag* savnsmynd

Í farnu viku kunngjørdi Smyril Line ársroknskapin hjá sær fyri farna ár. Úrslitið var ikki av tí besta, men samstundis var sagt, at árið í ár sær munandi betur út, tí bókingarnar eru nógv fleiri í tali. Hetta sæst eisini aftur í talinum av ferðandi, sum í dag og í komandi viku fara til Danmarkar í páskafrí.

**Vaksandi undirtøka fyri pakkaferðum**

Áki Jespersen, sølu- og marknaðarleiðari á Smyril Line sigur, at í kvøld fara ikki færri enn 1.320 ferðafólk og umleið 300 bilar við Norrønu, og tað er ómetaliga nógv fyri hesa ársins tíð.

– Ein stórur partur av hesum skal til Danland í Blokhus, so tað verður talan um heila føroyska koloni, sum verður har næstu vikuna, sigur Áki Jespersen.

Eisini í komandi viku fara nógvir føroyingar av landinum við Norrønu. Komandi hósdag, tá ið kósin verður sett móti Danmark, verða ferðafólkini 940 í tali, og gott og væl 250 bilar verða við. Aftur tá fer ein stórur partur av ferðafólkunum í Danland í Blokhus, sum føroyingar veruliga hava tikið til sín.

Áki Jespersen sigur, at tað er ein støðugt vaksandi áhugi fyri pakkaferðum millum føroyingar, og hetta sæst eisini aftur í hesum døgum.

– Gongdin hesi seinnu árini hevur verið tann, at fólk spyrja meira og meira eftir pakkaferðum, og tað eru fyrst og fremst barnafamiljurnar, ið eru áhugaðar í slíkum ferðum.

Tað er jú so ómakaleyst at pakka sær bilin, sigla niður og síðani koyra til frítíðarstaðið og pakka bilin út, greiðir Áki Jespersen frá.

## Gongur væl hjá Atlantic Navigator

Komandi sunnudag ella mánadagin kemur Atlantic Navigator til Klaksvíkar at landa Norðlýsið skrivaði í gjár á heimasíðu sínari, at skipið í løtuni roynir onkustaðnis millum Rockall og Føroyar, og at fiskiskapurin hevur verið nøktandi. Blaðið skrivar, at Atlantic Navigator hevði umleið 1.100 tons av surimi inni og eini 400 tons av mjøli.

**tn**


## Tekniskur leiðari til Vestmanna Kommunu

Í sambandi við at Tekniski leiðarin hjá okkum tekur við nýggjum avbjóðingum, verður starvið hervið lýst leyst at søkja.

Tekniski leiðarin hevur dagligu leiðsluna av Teknisku deild hjá kommununi um hendi.

**Arbeiðsuppgávurnar eru m.a. hesar**
- at hava dagligu umsitingina av øllum tekniskum útbúnaði hjá kommununi.
- málsviðgerð og ráðlegging.
- tilrættalegging og stýring av kommunalum uppgávum – eisini peningaliga.
- at standa fyri útbjóðingum og gera tilmæli til avvarðandi nevndir í bygdarráðnum.
- bygdar- og byggiætlanararbeiði.
- projektering og eftirlitsarbeiði.
- at standa fyri og menna skrásetingararbeiðið av tekniskum leiðingum.

**Vit vænta, at tú**
- er byggifrøðingur, verkfrøðingur, arkitektur ella hevur aðra viðkomandi útbúgving.
- hevur leiðsluroyndir, torir at taka skjótar avgerðir og standa við ábyrgd.
- dugir væl at samskifta við onnur og hevur góðan skriviførleika.
- ert røkin og dugir væl at arbeiða sjálvstøðugt.
- hevur góðan telduførleika og dugir at brúka m.a. skrivi- og tekniforrit.

**Vit bjóða tær**
- góða løn til rætta førleikan.
- møguleika fyri skeiðum sum varða av arbeiðsøkinum.
- eitt sera fjølbroytt og spennandi starv við góðum møguleikum at menna seg persónliga.

**Setanarviðurskifti**
Starvið er fulltíðarstarv og hevur tilvísing til Teknisku nevnd og borgarstjóran.
Lønar- og setnaðarviðurskifti eru við avvarðandi yrkisfelag ella eftir nærri avtalu.

Er hetta nakað fyri teg? Send okkum eina umsókn til:

**Vestmanna Kommuna**
**Bakkavegur 16**
**FO-350 Vestmanna**
Umsóknir skulu merkjast **"Tekniskur leiðari"**

Umsóknin má verða okkum í hendi í seinasta lagi 28. apríl. 2006. Miða verður eftir at seta starvið frá 1. juni 2006 ella eftir avtalu.

Hevur tú fleiri spurningar? Ring á tlf. 47 01 15 og fá meira at vita um starvið.

*Vestmanna Kommuna skilar sær rætt til frítt at velja ímillum umsøkjararnar ella ongan at velja.*

*Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.*

Vestmanna Kommuna
www.vestmanna.fo